## Reinsdjór hótt

Tann veksandi hitin á Jørðini órógvar nú reinsdjórini í tí arktiska økinum har norðuri í Kanada, sigur amerikanska sjónvarpið CBS. Serfrøðingar siga, at broytingarnar í veðurlagnum hava broytt lívskorini hjá reinsdjórunum munandi, og tá stovnurin er lítil frammanundan, kunnu broytingarnar hótta stovnin. Millum annað regnar tað verri í Norðurkanada nú enn fyrr, og tá regnið frystir til ís, hava reinsdjórini ilt við at fáa ta neyðugu føðina.



## Trolari tikin

Leygardagin tók norska sjóverjuskipið "Stålbas" ein polskan trolara fyri ólógligan fiskiskap 25 fjórðingar norðan fyri Bjarnoynna. Í einum vanligum eftirliti fóru menn frá norska skipinum umborð at kanna veiðu og reiðskap hjá trolaranum "Polonus", og kanningin vísti, at trolarin hevði alt ov nógvan ungfisk í lastini. Sjóverjuskipið gav tí trolaranum boð um at fylgja við inn til Tromsø, og har varð málið latið løgregluni í dag.

# Norröna við kós móti Skotlandi

**Í morgun stevndi Norröna á sína fyrstu almennu ferð á hesum sinni úr Føroyum til Scrabster í Skotlandi**

FERÐING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Smyril Line hevur bjóðað ymiskum umboðum við á hesa fyrstu ferðina, og soleiðis er Sosialurin eisini bjóðaður við og er umboðaður.

Sambært ferðaætlanini loysti Norröna í Havn klokkan 08.30 í morgun og verður í Scrabster í kvøld klokkan 20.30.

Loyst verður aftur í Scrabster klokkan 22 við kós móti Bergen, haðani skipið kemur klokkan 16 í morgin.

Í Bergen verður loyst aftur klokkan 19 – ella tríggjar tímar eftir komuna, og síðan er skipið aftur á Havnini mikudagin klokkan 15.

Meðan Norröna liggur við bryggju í Scrabster á hesum fyrsta túrinum, verður móttøka hildin á nýggja Weigt Inn hotellinum í Thurso. Við móttøkuna verða almenn umboð fyri Skotland og umboð fyri skotskar tíðindastovur.

### Kendur staður

Scrabster er ikki ókend havn fyri føroyingar, tvørtur ímóti.

Fyrst sigldi Smyril og seinni gamla Norröna til Scrabster, og mangur føroyskur fiskimaður hevur eisini verið á hesum plássi við fiski.

Siglitíðin úr Føroyum er bert 12 tímar, og komin til Skotlands hava skotar nógv ymisk tilboð, bæði til vaksin og børn.

Á heimasíðuni hjá Smyril Line lesa vit, at í Skotlandi kanst tú njóta frálíkar frítíðardeplar við vøkrum hvítum sandstrondum, matstovum, stórum spæliplássum og svimjihyljum. Tú kanst eisini njóta frálíkar mentanar- og náttúruupplivingar og síggja gomul slott og søguligar bygningar.

- Prísstøðið er lágt, og skotar eru tiltiknir blíðir, sigur Smyril Line.

### Ferð og gisting

Smyril Line er til reiðar at kunna teg sum ferðamann um teir møguleikar, sum eru í Skotlandi, og felagið selir eisini ferðir við gisting.

Ein av fleiri møguleikum er frítíðardepilin í Nairn, ein annar er frítíðardepilin Granni's í Dornoch.

- Her finst alt, sum ynskist til eina familjuferð, snjóhvít sandstrond, sum er ein sannur fongur fyri børnini, svimjihylur, spæliplass, handlar, matstovur - og pubbir.

Tað tekur bert fáar tímar at koyra til deplarnar í Nairn og Dornoch.

Verður ferðast í egnum bili í Skotlandi, hava fólk frælsi til sjálvi at ráða, hvagar tey fara, og hvussu leingi tey steðga.

Smyril Line hevur eisini hugskot um, hvussu tú á eini rundferð kanst ferðast í egnum bili og síggja ein heilan hóp í Skotlandi.

Í sínari tíð, tá Norröna sigldi upp á Scrabster, settu býarnøvnini, Thurso og gamli fiskivinnubýurin Wick, seg fast í minnið.

Nú hevur Smyril Line so latið uppaftur fyri møguleikanum at vitja aftur um hesar leiðir.

### Loch Ness

Eitt av kendu støðunum í norðara parti av Skotlandi, er býurin Inverness, ið hevur alt, sum einum stórbýi hoyrir til - og ikki minst hitt tiltikna forndjórið, sum skal vera í Loch Ness vatninum.

Nógv gomul og søgulig slott og bygningar eru eisini at síggja í Skotlandi.

Tey, sum kundu hugsað sær eina Skotlandsferð í summar, kunnu altíð hyggja inn á heimasíðuna hjá Smyril Line www.smyrilline.fo, har kunnað verður um ymiskar ferðir, møguleikar og tilboð.




*Siglingin hjá Norrønu úr Føroyum til Skotlands er aftur veruleiki – og í morgun fór ferðamannaskipið á sína fyrstu almennu ferð hagar*

*Mynd: Jens K. Vang*




*Ferðamøguleikarnir í Skotlandi eru nógvir, og ikki minst frítíðardeplarnir í Nairn og Dornoch eru áhugaverdir til familjuferðir*